## VALGREINAR

# Áhaldandi møsn tjóðveldisformansins

**Johan Dahl**
*Løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin*



Myndatalan hjá Høgna Hoydal, er vit at blíva ein áhaldandi endurgivin pláta sum eftirhondini er íkki so lítið slitin.

Seinastu av slagnum eru hesi:

Túrurin við árabátinum við ringum áralagið rógvandi í strongin ( óðamannaverk fyri einhvønn, uttan nú falnu samgonguna) Fullveldis - Kalvin (við manglandi 24 yvirtøkum) sum nú er drigini á borðið, - men har er marrumyndin sambandsstýrið, sum kvettir línuna á stokkinum.

Um so verður er tað einans at frøðast um ,fyri alt føroya fólk.

Nú tosa teir so eisini um eitt Norðuratlantiskt OPEC í fiskivinnuhøpið (enn ein fatamorgana)

Ásannast má, at útvatnaða valskrá Tjóðveldismanna, er eftirhondini ikki stórt annað enn tómir flosklar og orðaskvaldur.

At yvirhøvur torað at tosað um 24 yvirtøkumál - uttan at nevna eitt einasta orð um, hvat hesi mál kostað og hvar pengarnir skulu komað frá, er ikki so lítið nasadjarvt.

Tað má verða eitt minstakrav, at tit eru erligir og siga Føroya Fólki hvat hesar yvirtøkur kostað og hvussu tær skulu framhaldandi fíggjast??

Gjøgnumskygnið er sera umráðandi, - eisini í hesum nevnda førinum Høgni Hoydal, so kom við tølum á borðið.

Góð fíggjarstýring siga tit - slíkt vrøvl, rætt og slætt, skal ein leita leingi eftir, tit hava nevniliga slettis ikki stýrt, men koyrt í fimta gearið inntil tit kollsigldu í stronginum við árabáti tykkara.

Tit siga at blokkurin ikki er brúktur,- at hann bara er av tí illa!!

Hvar eru so tær 5,1 milliardinar, sum tit hava fingið síðan 1998??

Og milliardirnar í avlopið sum reypað verður av??

Tá hetta landsstýrið kom til, bleiv sagt at:

"Nú skuldi verða liðugt við ábyrgdarloysinum" -

"ein nýggj tíð við nýggjum hugsunarhátti er komin" -

"munurin millum inntøkur og útreiðslur skulu vaksa positivt á hvørjum ári".

Tit hava verið til stóran skaða fyri føroyska búskapinum við førda politikki tykkara hesi árini tit hava sitið við landsins leiðslu.

Ein øking á rakstarútreiðslum landsins uppá 1,2 milliard frá 1998-2003 svarar til at frá 2004 , skal gjaldast 1,2 milliard meir um árið enn gjørt var tá tit komu til.

Góð búskaparstýring tað má sigast!!

Nógv er gjørt á eldraøkinum siga tit eisini ??

Spyr tey eldru og veiku, - so fáa tit at vita, hvussu nógv munagott tit hava gjørt har.

Ellis-og Røktarheim - hvussu nógv hava tit gjørt av teimum ?? Ikki eitt einasta pláss, í bestu tíðum nakrantíð.

Sokallaðu kreppuloysnirnar - Hví hava tit ikki gjørt nakað við tær í tey árini tit hava sitið??

Nú at byrja at tosað um avtøku av hesum, tá vit eru á veg inn í eina nýggja kreppu, má sigast at virka ikki sørt panikk kent.

Nei, tit sokallaðu fullveldismenn og kvinnur (nú sokallaði sjálvbjargnisfólk) - leggi tit heldur árarnar inn á báti tykkara ið er um at verða fyltur í stronginum og fari í bjargingarbátin meðan tit enn kunnu.

Vit skulu síðan royna at fáa sleipa kollsigldu skútu tykkara úr streinginum og aftur á slætt.

Ung sum eldri, sum skulu at setað krossin á enn einum lagnuvalið tann 20. januar, - tit skulu verða púra greið yvir eitt og tað er, at loysingarvongurin er ikki førir fyri at verða garantur fyri einum áhaldandi vælferðarsamfelagið.

Tað er bara ein flokkur sum er garantur fyri hesum tað er SAMBANDSFLOKKURIN, sum borgar fyri VÆLFERÐ, TRYGD OG TRIVNAÐI fyri øll.

Við at stuðla SAMBANDSFLOKKIN til komandi val, er TÙ við til at tryggja vælferðarsamfelagið Føroyar, fyri verandi og komandi ættarlið.

# Nýtt fólk til róðurs

**Edvard í Skorðini Joensen**
*valevni Javnaðarfloksin í Vágum*



Við Javnaðarflokkinum við róðrið sleppa smábátarnir at fiska frítt

Smáu útróðrarbátarnir eiga at verða tiknir úr fiskidaga-skipanini.

Javnaðarflokkurin vil virka fyri, at tað skal bera til at fara á flot og selja nakrar fiskar, uttan at hetta skal dragast av eini fiskidagaskipan, sum tann, ið fiskin drepur, onki tilknýti annars hevur til.

Menn, sum eru burtur stóran part av árinum, hava í dag ikki møguleika at fara á flot í síni frítíð og sleppa av við sína veiðu, um teir fáa meira, enn teir sjálvir klára at brúka.

Hetta vil Javnaðarflokkurin broyta soleiðis, at havið verður frítt fyri smábátarnar. Teir oyða ongan stovn.

Hesum máli náa vit við veljarans hjálp.

# Miðnámsdepil við Marknagilsvegin

**Annfinn Brekkstein**
*valevni sambandsflokksins í Suðurstreymoy*



Sambandsflokkurin legði fram uppskot í farnu tingsetu, um at betra umstøðurnar hjá Føroya Studentaskúla og HF-skeiði og Tekniska Skúla í Havn.

Hetta uppskot fekk ikki undirtøku í løgtinginum, takka verið tjóðveldisumboðunum í Suðurstreymoy. Og sum ikki einaferð blivu fólkaflokksumboðini flongd upp á pláss av tjóðveldinum, so úrslitið var at samgongan fekk forpurrað uppskotinum, við at raðfesta uppskotið um Miðnámsdepil við Marknagilsvegin 10 til 15 ár fram í tíðina, við tí fyri eyga at steðga uppskotinum.

Her gingu tjóðveldis- og fólkaflokksumboðini í Suðurstreymoy hon í hond at forpurra útviklingini í Tórshavn, sum kundi gagna øllum samfelagnum.

Sambandsflokkurin vil virka fyri at farast kann undir at byggja ætlaða Miðnámsdepilin við Marknagilsvegin, soleiðis at Føroya Studentaskúli og HF-skeið og Tekniski Skúlin í Tórshavn fáa tíðarhóskandi umstøður at virka undir.

# Einskiljingin og sosialistarnir

**Bjarni Djurholm**



Fiskavirking er í dag ein vælrikin fyritøka, sum kann seljast, júst tí, at fólkaflokkurin vann og donsku skriviborðsloysnirnar hjá tjóðveldinum og øðrum taptu.

Tjóðveldið og javnaðurin ætla nú, at almennu vinnuaktivini skulu seljast. Ja, ofta etur hundur tað, hann havnar. Hetta eru somu flokkar, ið hava niðrað fólkaflokkin, sum hevur virkað fyri, at almenna vinnuvirksemið skal avmarkast og skilnaður fáast millum alment og privat.

Tjóðveldið var trygdin fyri, at donsku skriviborðsloysnirnar vóru framdar á sinni.

Kanska ikki so løgið, tí í frágreiðingini hjá ríkisumboðnum fyri 2003 sigur tjóðveldið,

- At privata vinnuliga virksemið skal samskipast við tað almenna. Allur handil við útheimin, innflutningur og útflutningur, peningur, bankar og valuta skal undir alment eftirlit.

Hetta er veruliga tjóðveldið, har teirra plastikkborgarligi boðskapur verður avdúkaður. Øll minnast hvussu teir leikaði í, tá undirritaði dittaði sær at spyrja Framtaksgrunninum, hvussu gekst við einskiljingini av Fiskavirking. Allur sosialistiski vongurin var á gosi, tí nú var onkur, sum ætlaði at pilka við monopolmodellið.

Tjóðveldið er jú uttast á vinstraveinginum, har flokkurin starvar við norðurlendskar sosialistar/kommunistar, har ímillum danska SF, Eindarlistan, IA og við íslendsku Vinstri-Grønu, har Torbjørn Jacobsen var gestarøðari í heyst, tá teir sendu Yasser Arafat samhugafjarrit!!

**Pseudoborgarligir**

At fjala veruleikan og tekkjast veljarunum vil tjóðveldið nú selja Fiskavirking. Gjørdist upprunaætlanin við Fiskavirking veruleiki, stuðlað m.a. av tjóðveldinum á sinni, so hevði einki verið at selt í dag. Her hevði verið øskukalt.

Fiskavirking var tá bert fyrsta stigið. Ætlanin var at skipa alment super-monopol, har skipini eisini vóru við. Soleiðis vildu øll hini virkini og skipini verið kvald sum frá leið.

Hetta var Royal Greenland umaftur ella enntá verri, ájavnt við monopolmodellið úr New Foundlandi í tríatiárunum, sum í hálva øld niðursjóðaði allan framburð har á leið.

**Fólkaflokkurin vann**

Hesum stríddist fólkaflokkurin ímóti. Tí var flokkurin varpaður í politiska kuldan og tjóðveldið tók um endan at gjøgnumføra monopol á landi og kvotaskipan á sjógvi. Men skriviborðsætlanin misseydnaðist. Fólkaflokkurin, saman við sambandinum, megnaði at innføra fiskidagaskipanina, sum í dag er heimskend. Eisini varð forðað fyri, at skipini endaðu undir monopolinum. Soleiðis kundi frælsa flakavinnan aftur fóta sær.

Fiskavirking er í dag ein vælrikin fyritøka, sum kann seljast, júst tí, at fólkaflokkurin vann og monopolætlanirnar hjá tjóðveldinum og øðrum taptu.

# Vælferðarsamfelagið skal varveitast

**Edva Jacobsen**
*valevni sambandsfloksins í Eysturoy*



Ásannað verður, at familian er ein av grundstuðlunum undir einum vælvirkandi samfelagi. Tí eiga allara umstøðurnar, sum eru við til at skapa fyritreytirnar fyri einum vælvirkandi familjulívi, at gerast so góðar, sum til ber.

Sambandsflokkurin fer støðugt at arbeiða fyri:

- Teimum sjúku, veiku og gomlu
- Teimum, ið bera brek
- Barnafamiliunum

Fyri sambandsflokkin er vælferðarsamfelagið og tað persónliga frælsið hjá tí einstaka meira virðismikið enn nationalistiskar hugsjónir, og flokkurin fer tí ongantíð at seta vælferðina upp á spæl fyri at gera Føroyar meira sjálvbjargnar. Einki skal gerðast í óðum verkum, men flokkurin hevur tað mál, at vit í Føroyum skulu hava sama livistøði sum hini norðurlondini hava.

Fullveldissamgongan tey bæði seinastu valskeiðini hevur havt ilt við at handfara hesi máløki.

Hetta setir okkum í ringt ljós, tí dygdin í einum vælferðarsamfelag verður í stóran mun mett eftir, hvussu samfelagið fer um teir veiku samfelagsbólkarnar.

Vel vælferðina, vel sambandsflokkin.



Danska tíðindastovan Ritzau:

# Jørgen gjørdi gjøldur burtur úr fiskifrøðingum

**Danska tíðindastovan Ritzau skrivar, at millum annað ein fyrrverandi føroyskur landsstýrismaður gjørdi fiskifrøðingar til láturs á fundi í Hirtshals mánakvøldið**

FISKIFRØÐI

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

– Handan yvirskriftin er í so skørp.

Soleiðis svarar fyrrverandi landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum, Jørgen Niclasen, tá ið hann fær at vita um ein tíðindagrein fra donsku tíðindastovuni Ritzau.

– Havbiologer latterliggjorte i Hirtshals, skrivar Ritzau um fundin, sum var hildin í Hirsthals mánakvøldið.



*– Fiskifrøðingarnir eru ikki so fegnir um tað, sum Jón Kristjansson førir fram, men eg haldi ikki, at vit hava gjørt gjøldur burtur úr nøkrum fiskifrøðingi. Tað er at taka í so harðliga til, heldur Jørgen Niclasen*

Og ein av teimum, sum sambært Ritzau skuldi havt gjørt gjøldur burtur úr havbiologunum frá ICES, ið eisini vóru við á fundinum, var Jørgen Niclasen. Hann legði tøl fram, sum vístu at føroysku fiskistovnarnir vuksu, hóast meira varð fiskað, enn ICES mælti til.

### Frøðingar fara skeivir

Á fundinum, har 120 fólk – lokalpolitikarar, fiskimenn, fólkatingslimir og onnur – vóru til staðar, greiddi Jørgen Niclasen frá føroysku fiskidagaskipanini, og íslendski fiskifrøðingurin Jón Kristjansson hevði eisini fyrilestur um sína fatan av fiskistovunum.

– Vit løgdu fakta fram, sum vístu fiskifrøðingar eru farnir skeivir. Tølini vísa, at tað er skeivt, tá ið fiskifrøðingarnir siga, at stovnarnir skulu verða stórir fyri at fáa stóra tilgongd. Tað er beint øvugt. Smáir stovnar fáa stóra tilgongd, meðan stórir stovnar fáa lítla tilgongd, sigur Jørgen Niclasen.

– Fiskifrøðingarnir eru ikki so fegnir um tað, sum Jón Kristjansson førir fram, men eg haldi ikki, at vit hava gjørt gjøldur burtur úr nøkrum fiskifrøðingi. Tað er at taka í so harðliga til, heldur fyrrverandi landsstýrismaðurin.

Hann hevur í heyst havt líkandi fyrilestrar í Bretlandi, har áhugin fyri føroysku fiskidagaskipanini eisini er stórur.

J. Broncksgøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo

www.smyril-line.com

NÝGGJA FERÐAÆTLANIN HJÁ NORRÖNU

Eftir 10. januar 2004 sær vetrarferðaætlanin hjá Norrönu soleiðis út:

| Havn | Dagur | Koma | Fráferð | Januar | | | | Februar | | | | Mars | | | | Apríl | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Hanstholm | Leygardag | 11.00 | 16.00 | 10 | 17 | 24 | 31 | 07 | 14 | 21 | 28 | 06 | 13 | 20 | 27 | 03 | 10 | 17 | 24 |
| Bergen | Sunnudag | 06.00 | 06.30 | 11 | 18 | 25 | 01 | 08 | 15 | 22 | 29 | 07 | 14 | 21 | 28 | 04 | 11 | 18 | - |
| Lerwick | Sunnudag | 16.30 | 17.00 | 11 | 18 | 25 | 01 | 08 | 15 | 22 | 29 | 07 | 14 | 21 | 28 | 04 | 11 | 18 | - |
| Tórshavn | Mánadag | 06.00 | 17.00 | 12 | 19 | 26 | 02 | 09 | 16 | 23 | 01 | 08 | 15 | 22 | 29 | 05 | 12 | 19 | - |
| Seyðisfjörður | Týsdag | 09.00 | - | 13 | 20 | 27 | 03 | 10 | 17 | 24 | 02 | 09 | 16 | 23 | 30 | 06 | 13 | 20 | - |
| Seyðisfjörður | Mikudag | - | 18.00 | 14 | 21 | 28 | 04 | 11 | 18 | 25 | 03 | 10 | 17 | 24 | 31 | 07 | 14 | 21 | - |
| Tórshavn | Hósdag | 13.00 | 20.30 | 15 | 22 | 29 | 05 | 12 | 19 | 26 | 04 | 11 | 18 | 25 | 01 | 08 | 15 | 22 | - |
| Lerwick | Fríggjadag | 08.30 | 09.00 | 16 | 23 | 30 | 06 | 13 | 20 | 27 | 05 | 12 | 19 | 26 | 02 | 09 | 16 | 23 | - |
| Bergen | Fríggjadag | 21.00 | 21.30 | 16 | 23 | 30 | 06 | 13 | 20 | 27 | 05 | 12 | 19 | 26 | 02 | 09 | 16 | 23 | - |



Ferðist 2 og gjaldið fyri 1 til Danmarkar og aftur

2 fyri 1 til Hanstholm 2.990,-

Ferðist tvey í innv. 2-koyggjukamari við wc/bað á leiðini Tórshavn-Hanstholm og aftur og gjaldið fyri ein.

Aðrir prísir eru galdandi í apríl

Ferðist 2 og gjaldið fyri 1 til Noregs og aftur

2 fyri 1 til Bergen 2.380,-

Ferðist tvey í innv. 2-koyggjukamari við wc/bað á leiðini Tórshavn-Bergen og aftur og gjaldið fyri ein.

Ferðist 2 og gjaldið fyri 1 til Hetlands og aftur

2 fyri 1 til Lerwick 1.790,-

Ferðist tvey í innv. 2-koyggjukamari við wc/bað á leiðini Tórshavn-Lerwick og aftur og gjaldið fyri ein.

Ferðist 2 og gjaldið fyri 1 til Íslands og aftur

2 fyri 1 til Seyðisfjörð 2.200,-

Ferðist tvey í innv. 2-koyggjukamari við wc/bað á leiðini Tórshavn-Seyðisfjörður og aftur og gjaldið fyri ein.

Barnavinarlig Noregsferð

1 vika á Pers Hotel - 2 vaksin, 2 børn og bilur

Pers Hotel er ein av teimum fáu frítíðardeplunum í Noregi, ið hava baðiland. Depilin við bæði smáttum og íbúðum liggur í tí avbera vakra Gol-økinum. Sera barnavinarligt við einum hópi av frítíðarmøguleikum. Koyritíðin frá Bergen er einar 4-5 tímar.





1 vika á Pers úr 6.000,-

Íroknað er: Sigling Tórshavn-Bergen og aftur í 4-koyggjukamari innv. við wc/bað. Hartil 7 gistingar í smáttu, uttan kost og 2 gistingar í Bergen á út- og heimferðini.

1 vika í summarhúsi í Easterhoull í Hetlandi

1 vika úr 4.500,-

Íroknað ferð við uppihaldi fyri 2 vaksin og 2 børn við bili fram og aftur



1 vika í Danland-íbúð fyri 2 vaksin og 2 børn við bili

Danland er vorðið eitt hitt best umtókta ferðamálið hjá føroyingum, og ikki er tað heldur so løgið.

Danland frítíðardeplarnir hava vælinnrættaðar íbúðir við køki og nógv frítíðartilboð eru fyri bæði vaksin og børn.

Sí annars heimasíðuna www.danland.dk.



Januar - mars

1 vika í Danlandi 5.995,-

Íroknað er: ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari við wc/bað, innv. Uppihald í Danland-íbúð í 1 viku. Í Hirtshals, Blokhus ella Ebeltoft í tíðarskeiðinum 01.01.04-27.03.04



Hví ikki fara ein túr til Danland á páskum?

Apríl 2004

1 vika í Danlandi 6.995,-

Íroknað er: ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari við wc/bað, innv. Uppihald í Danland-íbúð í 1 viku. Í Hirtshals, Blokhus ella Ebeltoft í tíðarskeiðinum 01.04.04-15.04.04

4 fólk í bili til Geilo

6 tímar at koyra til/frá Bergen

Í samband við at vit sigla til Noregs allan veturin, fara vit at bjóða ferðandi framúr góð tilboð um skíferðir til Noregs.



Skíðferð til Noregs fyri 4 fólk í bili við uppihaldi

1 vika í Geilo 11.600,-

Íroknað ferð fram og aftur við Norrönu í 4 koyggjukamari v. wc/bað innv., yvirnátting 7 nætur í íbúð á Geilo Apartment í Geilo og 2 nætur í Bergen á út- og heimferð.

SMYRIL LINE